Lívdin
- í lívd hins hægsta

Juni 2007

SAMKOMAN ER IKKI EIN BYGNINGUR



Tann 15. juni fyllir Jógvan Zachariassen 40 ár, og samstundis kemur út bókin „Samkoman – innlit í samkomu Kristusar og samkomulív í 21. øld“, sum Jógvan hevur skrivað.

Bókin er ikki um nakra einstaka samkomu, men umtalar øll endurfødd menniskju, sum samkomu Guds. Bókin svarar á ein einfaldan hátt spurningum viðvíkjandi tí, sum Bíblian lærir um samkomuna og um samkomulívið. *Jógvan gevur eisini sera góðar og praktiskar vegleiðingar, hvussu samkomur okkara kunnu vera meira viðkomandi á okkara døgum.*

„Samkoman – innlit í samkomu Kristusar og samkomulív í 21. øld“, er ein bók ið hjálpir tær at síggja, at samkoman er ikki ein avoldað losja, ið er menniskjum í 21. øld týdningarleys og óviðkomandi. Nei, samkoman er ein sunn, lívfør og virkin lívvera, sum Gud við Heilaga Andans megi nýtir til at útinna arbeiði Sítt á jørð.

Nú er tað framíhjárættur og ábyrgd okkara at vera við í hesum arbeiði. Tá ið samkoman ger tað, sum Jesus Kristus hevur kallað hana til, er hon tann mest livandi, viðkomandi, umbroytandi og kollveltandi kraftin á jørðini, sum rætt og slætt fær fólk at reisast og undrast.

Vit gleða okkum til bókina og ynskja Jógvani hjartaliga tillukku við 40 ára føðingardegnum.

„Samkoman er ikki ein bygningur. Samkoman er ikki eitt stað, har fólk hittast. Samkoman er endurfødd menniskju, sum dagliga liva lív Harrans Jesusar í tí, tey gera, og allastaðni, har tey fara. Latið okkum tí ikki halda, at vit skulu ganga í eini samkomu. Nei latið okkum vera samkoman.“

Bridged Willard

Gleð teg um hesar sannleikar

Tað er ein undurfullur sannleiki, at Heilagi Andin tekur bønir okkara til Faðirin, tá ið vit ikki sjálvi duga at seta orð á tørvir og kenslur okkara.

„So kemur eisini Andin veikleika okkara til hjálpar; tí vit vita ikki, hvat vit skulu biðja um, sum biðið eigur at verða; nei, Andin sjálvur biður fyri okkum við suffum, ið ikki kunnu sigast. Og Hann, ið rannsakar hjørtuni, veit, hvat tráan Andans er; tí eftir vilja Guds biður Hann fyri hinum heiløgu“ (Róm. 8:26-27).

Her eru fimm undurfullir sannleikar, sum vit kunnu gleðast yvir frá hesum versunum:

1. Gleð teg yvir hetta: Gud krevur ikki, at vit skulu kenna vilja Harrans í øllum smálutum í lívinum – og tað er í lagi, at vit ikki kenna vilja Guds í øllum. Hann leiðir okkum kortini.

2. Gleð teg yvir hetta: Gud stendur ikki klárur at straffa okkum og skelda okkum út, tá vit óttast, ivast og eru veik. Hann hevur samkenslu við okkum og biður fyri okkum.

3. Gleð teg yvir hetta: Guds verk í okkum og fyri okkum, er ikki avmarkað av og heldur ikki treytað av, hvat vit skilja ella duga at úttrykkja í orðum.

4. Gleð teg yvir hetta: Heilagi Andin biður fyri okkum í øllum truplum umstøðum í lívinum – Gud er ikki ímóti okkum. Hann er fyri okkum!

5. Gleð teg yvir hetta: Bønir Heilaga Andans fyri okkum eru altíð eftir vilja Guds – og Gud sigur altíð „ja“ til bønir, sum eru eftir vilja Hansara. Tí sigur Gud ongantíð “nei” til bønir Heilaga Andans.

Jógvan Zachariassen

Vinir í Lívdini

Heilsan til samkomuna

Gvøðny og Janus Gunnarsson í Birmingham hava sent eina heilsan til Lívdina. Tey ynskja at takka samkomuni fyri forbønir, og fyri ta hjálp samkoman hevur veitt teimum í tænastuni fyri Harran.

Janus er liðugur við tey trý árini, ætlanin var at ganga á Birmingham Christian College (BCC). Nú er ætlanin, at hann tey komandi árini skal leggja størri dent á evangelisering og at hava møti og bíbliutímar. Gvøðny verður nú liðug við fyrsta árið og fer væntandi at taka tvey ár afturat á BCC.

Saman við Høgna Johannesen fara tey at skipa fyri bókaborði í miðbýnum í Birmingham við tí endamáli at fáa samtalur í lag við muslimar og at kunna greiða teimum frá boðskapinum um Jesus Kristus.

Høgni hevur skrivað eina traktat, og tey fyrstu eintøkini eru longu prentað. Ætlanin er at skriva fleiri traktatir. Ætlanin er eisini at keypa nakrar góðar traktatir, sum tey kunnu deila út til fólk. Til hetta krevst peningur, og til tað hava bæði samkomur og einstaklingar ein møguleika at stuðla arbeiðinum.

Janus og Gvøðny Gunnarsson

Tey nevna eisini:

„Lærusveinaskúlan í Pakistan“, sum verður í september mánað.

Gvøðny og Janus siga m.a. „Tað er við stórari gleði, at vit hugsa um samkomuna Lívdina, og vit eru sera takksom fyri at kunna njóta tíð saman við tykkum, hvørja ferð vit eru heima“.

Fyrst í juni koma tey heim, og ætlanin er tá at vitja í nøkrum av samkomunum kring landið.

Minnist til at siga okkum frá!

Vit heita á øll í samkomuni at siga okkum frá, um okkurt er, sum tit ynskja at fáa við í faldaran, eitt nú børn, ið verða fødd, brúdleyp, gullbrúdleyp og annað.

Í sambandi við rundar føðingardagar, skriva vit ein stubba um fólk í samkomuni, sum fylla 50, 60, 65, 70, 75, 80, 85, 90, 95 og 100 ár.

Teldupostadressan er: faldarin@livdin.fo

Tillukku við barninum

2. mai fingu Jóna og Dánjal Jóhan Thomsen tíggju mánaðar gamla sonin Dávid, sum er ættleiddur úr Korea. Eydnuríka familjan býr í Mækjugøtu í Havn

Ein undurkelda í Lívdini

Á møtinum sunnudagin 20. mai lívgaði Eyðun Jacobsen, saman við døtrunum Birgit, Kristinu og Heidi, samkomuna við sera góðum sangi og tónleiki.

Saman sungu tey fleiri sangir av fløguni „Ein undurkelda“ sum Sp/f Strok v. Eyðun Jacobsen gav út í 2006.

Eyðun er klaksvíkingur, sum hevur búð í mong ár í Danmark. Í dag býr hann saman við familju síni á Glyvrum.

Eyðun gav í hesum sambandi samkomuni nakrar fløgur, sum fólk kunnu keypa og samstundis stuðla Lívdini. Vit takka Eyðuni og døtrunum.

Birgit, Kristina, Heidi og Eyðun

Tiltøk

TILTØK Á BREKKU 3

(bygningurin aftan fyri MBM)

Undirvísing, bøn og bønarskúli **týskvøld kl. 20.00**

5. juni	Húsbólkar
12. juni	Evni: „At akta Guds leiðslu“ Talari: Jógvan Zachariassen
19. juni	Evni: Opið evni
26. juni	Húsbólkar

Bønarløta fyri ung **mikukvøld kl. 18.00**
Ungdómsmøti **fríggjakvøld kl. 21.00**

Gentubólkur fyri gentur í 1. og 2. flokki

Leygardagin 28. apríl kl. 11 byrjaði ein gentubólkur fyri gentur í 1. og 2. flokki í hølunum á Brekku. Endamálið við bólkinum er, at genturnar skulu læra hvør aðra betur at kenna og á tann hátt skapa betri trivnað teirra millum í Lívdini. Genturnar koma saman triðja hvønn leygardag frá kl. 11 til 17.

Rachel Eysturtún, tlf. 771024, er stigtakari, og hon hevur ábyrgd fyri bólkinum.

Ungdómsmøtini flutt í skúlan

Ungdómsmøtini, sum hava verið á Brekku fríggjakvøld kl. 20.30, eru nú flutt í Hoyvíkar skúla og byrjað verður kl. 21.00.

AC Milan og Liverpool á Brekku

Mikukvøldið 23. mai varð skipað fyri hugnakvøldi á Brekku, har Champions League finalan millum AC Milan og Liverpool varð víst á stórskýggja.

Í hálvleikinum og eftir dystin hugnaðu sjónvarpshyggjararnir sær við t.d. kaffi, sodavatni, chips og øðrum góðum.

Úrslitið av dystinum varð, at AC Milan vann 2-1, og gjørdust teir harvið meistarar.

Umsitingartænasta í Lívdini

Samkoman er nú vorðin so stór, at elstabólkurin brúkar nógva tíð og orku til umsitingarlig viðurskifti og til samskipan av ymsu tænastunum.

Hetta halda vit ikki verða rætt, og tí sóknast vit eftir einum umsitingarleiðara til Lívdina. Hugsanin er, at viðkomandi skal hava yvirorðnaðu ábyrgdina fyri øllum tí umsitingarliga í samkomuni.

Hevur onkur hug, og heldur seg hava tíð og hegni til hesa tænastu, verður viðkomandi biðin um at siga leiðsluni frá. Tað ber eisini til, at tvey ella fleiri sláa seg saman um hesa tænastu.

Vit heita eisini á samkomuna um at biðja fyri hesi sera týdningarmiklu tænastu í Lívdini.

Áhugað kunnu seta seg í samband við Jens Wang á tel. 322200 ella 219903.

Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla

Sunnudagin 3. juni

Familjumøti kl. 10.30:	*Evni: Ungdómsarbeiði í Lívdini.*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00:	*Evni: Rómbrævið.*
	Talari: Jógvan Zachariassen.

Sunnudagin 10. juni

Familjumøti kl. 10.30:	*Evni: Ung í Lívdini luttaka.*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00:	*Evni: Rómbrævið.*
	Talari: Jógvan Zachariassen

Sunnudagin 17. juni

Familjumøti kl. 10.30:	*Evni: Vitnisburðamøti.*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00:	*Evni: Opið evni.*
	Talari: Absalon Áargarð.

Sunnudagin 24. juni

Familjumøti kl. 10.30:	*Evni: At brúka gávur sínar.*
	Talari: Jógvan Zachariassen.
Tilbiðjan og læra kl. 12.00:	*Evni: Rómbrævið.*
	Talari: Jógvan Zachariassen.

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni.*

Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo